HÓGV HANDILS-VIRKI
660 Søldarfjørður
Tlf. 41963 Fax 42025

VIT ERU FLUTT
í fyrrv. PW-handlarnar í Søldarfirði

SØLA & VERKSTAÐUR

Í ERVA er handilin við rørum, rørlutum, saniteti, kranum umfr. rørum og øðrum til vertilatión o.a.

ALT FYRI KAPPINGARFØRAN PRÍS!

Í NEÐRA er okkara nútímans verkstaður, sum greiðir alt klippi-, boyggi-, valsi, sveisi- og annað arbeiði bæði SKJÓTT & VÆL!

– og tað eru vit, ið framleiða og selja
FØROYSKA KETILIN
ið fleiri og fleiri velja

Vælkomin inn á gólvið til eitt prát

Tlf. NÚ 41963 Fax NÚ 42025

Peter Straarup í nýggjari bankagølu

Ein óavmarka tryggingartrygd frá Den Danske Bank til AP Møller hevur skapt eina nýggja bankagølu í Danmark. Krúnprinsurin í Den Danske Bank, Peter Straarup, stendur sentralt í málinum



44-ára gamli Peter Straarup, sum verður mettur at vera maðurin, sum verður settur ovast á rókina í Den Danske Bank, tá Knud Sørensen næsta ár fer frá sum orðførandi í stjórnini hjá bankanum, vil eftir øllum at døma, sita væl up sátt við størsta kundan hjá bankanum, AP Møller.

Jyllandsposturin hevur fingið fatur á skjølum, sum avdúka, at Den Danske Bank hevur veitt AP Møller eina óavmarkaða tryggingartrygd, sum í ringasta førði kann kosta bankanum milljardir, hóast ábyrgdarvandin bert er bókaður til kr. 8,50 í roknskapinum hjá bankanum.

Málið snýr seg í stuttum um, at AP Møller í 1989 vildi selja otta oljuskip til eitt enskt leasingfelag, sum so skuldi leiga Mærsk skipini aftur. Hetta er ein vanligur handil í bransjuni. Men eftir Exxon Valdes vanlukkuna, sum var sama ár, og sum kostaði 50 milljardir, kravdi enska felagið eina óavmarkaða trygd, fyri at tryggja seg móti møguligum óhappum við skipunum.

Hesa trygd kundu tryggingarfelógini kring heimin ikki lata, men her var tað at Den Danske Bank veitti AP Møller eina hjálpandi hond, og gav hesa trygd, sum ikki gongur út fyrr enn í 1999.


Tá Peter Straarup verður mettur at hava ábyrgdina av hesum, er tað tí, at hann hevði ábyrgdina av slíkum avtalum um tað mundi, og tað var hann, sum syrgdi fyri, at ávaringarnar frá revisorunum hjá bankanum, ikki vunnu fram til stjórnina í bankanum.

Fíggjareftirlitið hevur eisini fingið at vita um málið, men teir hava ikki gjørt tað stóra burtur úr tí. Teir hava í øllum stillum ávara móti hesi avtalu.

Vandin fyri, at eitt óhapp skuldi henda skipunum hjá Mærsk, hevur verið kallaður teoretiskur, men vísa menn á, at allar ólukkur eru teoretiskar líka til tær henda, og skuldi eitt størri óhapp kosta Den Danske Bank eina milljardaupphædd (í ringasta førði 20 mia. kr., sum er allur egin-peningurin hjá bankanum), hevði tað fingið avleiðingar fyri bankan, og tær 2 mió. kundarnar hjá honum.

Gólan hevur enn einaferð kastað ljós á ivasom viðurskiftið í Den Danske Bank, og í Danmark verður hetta málið mett størri enn tiltikna føroyska Bankamálið, har Den Danske Bank, og ikki minst sami Peter Straarup, stóðu fyri skotum.

ek



Jóan Karl Høgnesen heldur ikki, at vaktarskipini enn verða avloyst at fylgisveinaeftirliti. Mynd: Kalmar

Eftirlit við fylgisveini neyvan í føroyskum sjógvi

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

– Tekniskt letur tað seg væl gera at fylgja við hvar skipini royna við fylgisveinatøkni, men eg trúgvi neyvan, at føroyski fiskimaðurin er sinnaður, at vaktartænastan allan sólarringin skal vita hvar hann flýtur. Tað vildi verið tað sama, sum um politiið kravdi, at hvør bilførari hevði ein satelittmóttakara í bilinum, soleiðis at teir kundu fylgja við hvar teir vóru, sigur Jóan Karl Høgnesen, leiðari á Vaktar og Bjargingartænastuni.

Tilmæli frá skipanarnevndini um fiskidagar fer at krevja økt eftirlit við hvar skipini eru á føroysku grunnunum. Vit hava spurt leiðaran á Vaktar og Bjargingartænastuni, Jóan Karl Høgnesen, um ætlanir eru at fáa somu eftirlitsskipanir, sum eitt nú verða nýttar á Flemmish Cap. Har verður ein sendari settur umborð í skipið og síðan ber til yvir fylgisvein at fylgja við hvar skipið er statt.

– Hendan skipan ber til, men hvussu nógv hon kostar og um hetta er ein loysn undir Føroyum, tað veit eg ikki. Tað er eisini ein spurningur, hvat sagt verður til, at at fiskimenn verða avdukaðir hvønn einasta tíma í døgninum. Her má vera talan um ein juridiskan spurning. Eg haldi, at slíkt eftirlit stríðir móti grundlógini og vildi svara til, at ein slíkur sendari stóð í hvørjum bili í landinum, sigur Jóan Karl Høgnesen.

– Men hesin háttur fyri eftirliti vinnir alt meira fram úti í heimi. Tosað verður um hetta í altjóða eftirlitsstovnunum, sum hava eftirlit við fiskiskapi í altjóða sjógvi. Hetta er tekniskt møguligt, men eg trúgvi ikki, at tað er møguligt at fáa eina slíka skipan í gjøgnum í Føroyum, sigur hann.

Jóan Karl Høgnesen segði við Sosialin í gjár, at hann roknar ikki við at samlaða arbeiðsbyrðan hjá Vaktar og Bjargingartænastuni verður økt, um skift verður yvir til fiskidagar. Tá ongin kvota er í tonsum, so fær fiskiveiðueftirlitið á landi minni at gera, og ti verður hetta tøkt til at eykarbeiðið, sum verður at kanna skipini, meðan tey eru í sjónum.

Tíðindaskriv frá Bókadeild Føroya Lærarafelags

Walt Disney teknisøgur

7. skreythefti: Carl Barks savnið, Walt Disney teknisøgur í lítum um DUNNALD DUNNU og tey er nú í bókabúðunum



Í heftinum eru fimm klassiskar Barks-søgur.

Ræðuliga loyndarmálið hjá Gullfinni er tann fyrsta. Gullfinnur er altið sera heppin, og Dunnaldur hevur sett sær fyri at finna út av, hvat loyndarmálið er aftan fyri hepnið.

Í næstu søguni **Dunna í úlvaklæðum**, hevur Dunnaldur sett sær fyri at mótprógva, at tað letur seg gera at fáa dýr at skilja menniskju.

Í triðju søguni veddar Dunnaldur við granna sín. Veddimálið snýr seg um, hvørt Dunnaldur klárar at halda systursynir sínar frá at halda ólevnað í frítíðini. Dunnaldur ger av at halda frí um borð á einum húsbáti. Søgan eitur **Summarfrí í húsbáti.**

Tann, ið grevur eina grøv fyri einum øðrum, dettur ofta í hana sjálvur. Hetta orðatakið passar væl til næstseinastu søguna í heftinum. Dunnaldur og Gullfinnur leita eftir gimsteinum í søguni **Gimsteinar í heintu.**

Í seinastu søguni **Nýt peningin,** endir nakað óvæntað. Dunnaldur sleppur at nýta so nógvar pengar sum hann orkar. Tann, ið biður hann, er eingin annar enn Girikur gubbi, men tað er sjálvandi við ringum tannabiti.

Afturat søgunum er eisini ein grein, ið Geoffrey Blum hevur skrivað. Greinin ber heitið **Ein spurningur um persónleika.** Í greinini viðger Blum, hvussu Carl Barks myndaði dunnurnar í Dunnubýi, sum vit kenna so avbera væl.

Pauli Nielsen týðir søgurnar um Dunnald og tey.